vera serliga deiligt at búgva har. Nei, eingin trívist í 'øje-bæ' í longdini.

### Vit fara at angra tað

Tað er møguligt, at tað á pappírinum sær hugtakandi og spennandi út við stórum, høgum bygningum á rað og víðum parkeringsfløtum ímillum. Í forholdinum 1:25.000 tekur tað seg væl út, men hyggur tú bara eitt sindur nærri eftir - og ímyndar tær evt. at tú fert niður í umhvørvið og sær tað í forholdinum 1:1, er søgan ein onnur. Vit vilja so fegin vera sum hini í londunum rundanum okkum, men gloyma bara at hyggja at royndunum hjá teimum - ja, enntá okkara egnu. Tey, sum eru komin eitt sindur uppí árini, minnast kanska, hvussu hugtikin fólk vóru av Landssjúkrahúsbygginini, tá bústaðarblokkarnir vóru bygdir. Kenslan var, at nú fingu vit í Føroyum endiliga okkurt, sum luktaði eitt sindur av av altjóðagering, og sum gjørdi Havnina meira nútíðarhóskandi – og fólk vóru erpin av tí. Men bert eitt ártíggjund aftaná var fólkastemningurin helt vendur við.

Um byggiætlanin í Hoyvíkshaganum verður sett í verk, eri eg púra vís í, at helst bara eitt ártíggjundi fer eisini, til at havnarfólk fara at angra, at tey ikki hugsaðu seg betur um, tá tað nú endiliga skuldi vera - tá størsta byggiætlan nakrantíð í Føroyum varð sett í verk.

So eg krossi fingrarnar og vóni so innarliga, at tit í býráðnum í Havn nú ikki fara at blaka okkum út í at gera somu arkitektonisku mistøk, sum býir aðrastaðni úti í heimi hava (angrað, tey hava) gjørt. Jú, visiónir eru neyðugar. Framburður skal til. Men hetta ber brá av 'stórheitsvanvidinum' frá 80'unum. Hava vit einki lært? Lat tað ikki vera hetta, sum stendur eftir tykkum, tí hetta verður ikki nakar varði at vera erpin av. Um byggiætlanin verður gjøgnumførd soleiðis, sum hon sær út nú, verður tað eftir míni meting einki minni enn ein vanlukka fyri Havnina!

### Rík mentan gevur ríkt vinnulív

Heldur skulu vit læra av mistøkunum og gera nakað annað, sum er nógv skilabetri – og líka ambitiøst. Ja, meira kanska. Vísa heiminum, at vit – ístaðin fyri drepandi betonforstaðarbygging – kunnu byggja hugnalig og inspirerandi býarumhvørvi, sum eru nógv betri fyri virknið og trivnaðin hjá borgarunum – við somu hentleikum fyri borgararnar, sum henda byggiætlan hevur – bara enn fleiri.

T. d. havi eg lagt til merkis, at tað mentanarliga glógvar við síni fráveru í P/F Jákupi á Duls byggiætlan...! Fáast Havnafólk nú á døgum veruliga ikki við annað enn at íðka ítrótt og at shoppa í frítíðini? Eg spyrji bara.... Hví skal leikluturin hjá mentan og list enn einaferð undirmetast?

Óteljandi kanningar uttanlands vísa, at bara býir, sum hava eitt breitt mentanarligt útboð, megna at tiltrekkja nóg stórt tal av ressursusterkum og produktivum fólki, sum kunnu skapa meirvirði fyri býirnar. Skilagóð fólk seta høg góðskukrøv, tey krevja andaliga føði - tey tíma ikki at búgva í býum, har tey ikki fáa bjóðað nóg mikið av andaligari føði (– og her hugsi eg ikki bara um Várharra). Tí er tað prógvað ferð aftan á ferð, at tað er ein ósvikaligur samanhangur millum eitt ríkt mentanarlív og eitt ríkt vinnulív! Hetta hevur loysnin hjá P/F Jákupi á Dul eftir míni meting slettis ikki tikið hædd fyri.

### Setið ein arbeiðsbólk at umhugsa ætlanina umaftur

Og so aftur til P/F Jákup á Dul og býráðið: Góðu tit. Um áhugi er til tess, eri eg fús at bjóða meg fram til at luttaka í einum arbeiðsbólki, sum kann koma við konstruktivum hugskotum til, hvussu vit loysa vandamálini í býnum - og ístaðin skapa eina nýggja byggiætlan, sum tryggjar, at Havnin fær ein vakran, hugnaligan, virknan og ikki minst veðurgóðan býling, sum hóskar nógv betur til føroyska lands- og veðurlagið og til føroyska fólkið – m. a. við loysnum til húsaneyðina og møguleikum fyri alskyns aktivitetum fyri borgararnar, sum eru Havnini verdugir, og sum draga produktiv góðskutilvitandi virkin fólk til býin, heldur enn bara tey ressursuveiku.

Stutt sagt: Ein livandi og tryggan býling við ein virknum vinnu- og mentanarlívi, har fólk av øllum stættum fara at stórtrívast hvørt um annað.

*elinhein@mail.dk*

**FAKTA**

Fyri at fáa meira at vita um ghettoisering, lesið: "Regeringens strategi mod ghettoisering" her: HYPERLINK "http://www.inm.dk/publikationer/regpub_ghettoisering/index.htm" http://www.inm.dk/publikationer/regpub_ghettoisering/index.htm


HUXA

BORGARLIGT BORÐHALD

Ársveitsla og aðalfundurin hjá Fólkafloksungdómi

Aðalfundurin hjá Fólkafloksungdómi, verður fríggjakvøldið 24. februar 2006 kl. 19.00 á Hotel Føroyum.

Skrá sambært viðtøkum felagsins

Eftir fundin verður veitsla við døgurða, undirhaldi og tónleiki afturvið.

**Kostnaður fyri veitsluna er kr. 100,-**

Nýggjir limir kunnu tekna seg á tlf. 212491 ella 256762. Eisini ber til at tekna seg til huxa@huxa.fo

Allur HuXandi ungdómur er vælkomin!

STARVSFÓLK SØKIST

Starvið umfatar sølu av el-lutum.

Vit vænta at tú hevur royndir innan sølu og/ella tænastu. Dentur verður lagdur á at tú dugir væl at samskifta, er skyldsøkin og fyrikomandi.

Umsókn verður at senda til:

solar FØROYAR

Brekkutún 2 · Hoyvík · Postsmoga 105 · Att.: Finn Jørgensen
Tel 35 79 33 · solar@solar.fo

Vit hava fingið veingir




ÍSLAND ▪ FØROYAR ▪ HETLAND ▪ NOREG ▪ DANMARK

SBW Express bjóðar dygdargóða flogfrakt tænastu til ein kappingarføran prís.



Ring á telefon nr. 345960 ella 545970
ella skriva á teldupost cargo@sbwcargo.com

...Skjótasta flutningstænasta á Norðuratlantshavi !

SMYRIL BLUE WATER